# ´15

Savns Gull

Avrit frá kvf.fo



# Formæli

Annað árið hjá verkætlanini Savnsgull er farið aftur um bak, og væl er fingið burturúr.

Talan er um ovurstóra uppgávu, og higartil hevur dentur verið lagdur á at talgilda tíðindi og yvirlit yvir tað, sum er sent. Eisini er sjøtul settur á talgildingina av ljóðbandasavninum, og arbeiðið gongur væl.

At talgilda almenn søvn er ein stór avbjóðing, tí tøknin í tíðini ger, at vit sum brúkarar seta stór krøv. Við internetinum hava føroyingar fingið atgongd til søvn hjá øðrum og kunnu ómakaleyst leita fram upplýsingar um alskyns evni, bæði úr fortíð og nútíð, og sjálvandi skal tað eisini bera til at leita í føroyskum søvnum.

Einki er at ivast í, at tað almenna eisini tekur hesa avbjóðing í stórum álvara. Talan er um mentanararv, sum vit øll eiga, og játtanir til økið mennast. Savnið hjá Kringvarpinum er ein partur av hesum, ímeðan talgildingin av øðrum pørtum av mentanararvinum liggur hjá Søvnum Landsins.

Talan er um tilfar, sum er framleitt gjøgnum nógv Harrans ár, og tað er tíðarkrevjandi arbeiði at fara ígjøgnum alt hetta. Munurin á Kringvarpinum og øðrum mentanarstovnum er tó, at Kringvarpið altíð hevur verið ein hátøkniligur stovnur, og hetta setir sínar heilt serligu avbjóðingar til talgildingina. Tí hátøknin fyri 40-60 árum síðan er í dag tøkni, har eisini varðveitingin av útgerðini er ein avbjóðing, tí tílík útgerð er ikki tøk longur. Tað er snøgt sagt ein tíðaravmarking á, hvussu leingi vit kunnu talgilda bond.

Tað er tí í tøkum tíma, at komið er í gongd, og umráðandi er, at arbeiðið kann haldast innan tíðarkarmarnar, sum tann gamla tøknin setir.





**Andras Mortensen**
Stjóri á Søvn Landsins

Avrit frá kvf.fo



## Føroya Fólks miðlasavn

Kringvarpssavnið goymir ein heilt serstakan og stóran part av Føroya søgu frá 6. februar 1957 og fram til dagin í dag. Í savninum er nærum alt, sum er hent í Føroyum innan øll øki, og alt er miðlað óheft.

Kringvarpssavnið fevnir um 521.179 pappírskjøl, 26.846 útvarpsbond og 13.735 sjónvarpsbond. Og savnið er á goymslu í tveimum støðum: á Hjalla og í Sortudíki.

Longu undan aldarskiftinum varð talað um, at tíðin máar tilfarið í savninum, og at nakað mátti gerast fyri at bjarga tí. Tað hevur verið drúgført at koma so langt áleiðis, at farast kundi undir arbeiðið at bjarga savninum.

2015 hevur hilnast væl, og meira er komið burtur úr arbeiðnum at talgilda enn ætlað og væntað. Okkara søga verður varðveitt til komandi ættarlið á ein tryggan og góðan hátt.

Avrit frá kvf.fo

### VÍÐSJÓN

**Við at talgilda kringvarpssavnið skal Kringvarp Føroya verða størsta savn innan tíðindi, mentan og siðsøgu í Føroyum.**

**Við tíðini skal almenningurin hava atgongd til savnið, og við hesum skal Kringvarp Føroya verða fremsti mentanarberi innan økið.**

### MIÐSJÓN

**Miðsjónin er at bjarga øllum tilfarinum í Kringvarpssavninum.**

**Góðskan á tilfarinum skal verða eins høg og skrásetingin.**

**Við hesum tilfari skal Kringvarp Føroya ríka søgu, lív og samleika føroyinga við sendingum og tænastum, sum upplýsa, menna, undirhalda og varðveita Føroya søgur.**



## Søgugongd fyri verkætlanina

Talað varð um at bjarga útvarps- og sjónvarpssavninum, áðrenn Kringvarpið varð sett á stovn. Longu í 2002, tá Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya vóru tveir stóvnar, var skriv at lesa í Dimmalætting, at nú vóru bondini um at forfarast.

Í 2010 varð í eini frágreiðing mett um savnið, m.a. varð mett um, hvat kravdist fyri at bjarga savninum:  2,7 millión um árið í 10 ár, so kundi ljóðbond og sjónvarpsbond verða bjargað.

*Eitt týðandi stig at bjarga tilfarinum kom undan kavi, tá ið verklagslógin at byggja út kringvarpshúsið var fyri í fíggjarnevndini í mai 2013. Fíggjarnevndin skrivar í álit sínum, dagfest 3. mai 13, soleiðis um bandasavnið:*
*Fíggjarnevndin heldur, at nú útbyggingar verða framdar, er neyðugt samstundis at taka støðu til, hvussu bandasavnið í kringvarpinum verður varðveitt. Fíggjarnevndin heldur tí, at landsstýrismaðurin til fíggjarlógina fyri 2014 eigur at fyrireika eina skipaða gongd, so ferð verður sett á varðveitslu av bandasavninum frá 1. januar 2014. Landsstýrismaðurin eigur saman við kringvarpinum at umhugsa um uppgávan kann bjóðast út. Eisini eigur landsstýrismaður at umhugsa, í hvønn mun uppgávan kann gerast av fólki í vardum starvi.*

Í 2013 samtykti tingið eina eykajáttan, sum var 800.000 kr. Henda játtan gjørdi tað møguligt at fáa tól til vega at talgilda útvarpsbondini, eins og gamlar bandmaskinur hjá útvarpinum vórðu umvældar til hetta arbeiðið. Í 2014 vórðu játtaðar 900.000 kr., so gongd kundi koma á arbeiðið at talgilda savnið. Mass Hoydal varð settur sum samskipari. Fyrsta uppgáva hansara var at fáa lýst, hvussu farast kundi til verka. Tingið játtaði eisini verkætlanini 900.000 kr. í 2015, og Mass Hoydal varð settur sum leiðari fyri SavnsGulli, sum verkætlanin varð nevnd. Umframt at halda fram við arbeiðnum at talgilda útvarpspartin er ætlanin at talgilda sjónvarpssavnið fyrireikað.

Avrit frá kvf.fo

**FAKTA**

- **Í 2016 eru 900.000 kr. settar á Løgtingsfíggjarlóg – ein játtan, ið røkkur at talgilda útvarpssavnið.**
- **Um sjónvarpsparturin skal talgildast nú, er neyðugt at hækka játtanina 600.000 frá 2016 og tey komandi árini.**
- **[…] between now and some time between 2023 and 2028 analog materials would become inaccessible.**
  ***(Vísindagrein: iasa journal no 43 – July 2014)***




## Talgilding - tíðindaskjøl

Tíðindaskjølini - pappírsparturin - er tann mest støðuga og samansetta eindin í kringvarpssavninum. Í hesi savnseindini eru nærum øll tíðindi goymd síðani fyrstu útvarpssendingina tann 6. februar 1957 og fram til 1996, tá pappír varð skift út við teldu. Telduskipan varð brúkt undan 1996, men til ta tíð vórðu øll tíðindi prentað út og goymd sum skjøl. Øll hesi árini er nógv pappír savnað í goymsluni, ið telur væl oman fyri 500.000 pappírsskjøl. Nógv tann størsti parturin er tíðindi, men í savninum eru eisini skráir, veðurtíðindi, Koda-listar og annað tilfarð úr útvarpinum.

Arbeiðið at talgilda pappírspartin hevur hilnast væl. Mannagongdir eru gjørdar, so tilfarið verður talgildað, skrásett, eins og dygdin í SavnsGull-arbeiðinum regluliga verður kannað. Tað er gjørd ein broyting í arbeiðinum, sum lættir um. Upprunaliga vórðu skjølini rættað tvær ferðir. Nú verða tey rættað einaferð.

Arbeiðsgongdin er nú henda:

Pappírsskjølini verða tikin úr goymsluni. Tey vera OCR-viðgjørd, uppsett til forrit, ið er gjørt til hetta arbeiðið, og tey verða rættlisin.

Hvørt hálvár verður arbeiðið kannað. Tá verður tiggjunda hvørt skjal kannað, um feilir eru í rættlestri og skráseting. Í 2015 eru staðfestir feilir í 7,2 % av skjølunum.

Forritið, ið verður nýtt til hetta arbeiðið, er tilevnað og skraddaraseymað til SavnsGull, og er sett saman við øðrum forritum, so vit fáa tað rætta burturúr arbeiðinum. Í neyvum samstarvi við KT-deildina í kringvarpinum, ið hevur gjørt hetta forrit, hevur arbeiðið at talgilda skrivaðu tíðindini fingið eitt amboð, ið hevur stóran týdning fyri arbeiðið. Og við tí arbeiðsorku og áhaldni hjá starvsfólkunum í SavnsGulli, eru vit komin longur enn vit høvdu væntað í 2015.

Avrit frá kvf.fo








# Talgilda - útvarpsbond

Útvarpsbondini goyma nógvar ymiskar sendingar, har vit kunna hoyra fyrilestrar, barnaútvarp og mangt annað. Í savninum eru 26.846 bond og tað fyrsta er frá 6. februar 1957, tá útvarpið sendi fyri fyrstu fer. Í 2001 varð seinasta ljóðbandið nýtt í Útvarpi Føroya, og síðani er alt er tikið á upp á teldu og talgildað.

Arbeiðið at talgilda útvarpsbondini hevur hilnast væl. Mannagongdir eru gjørdar, so tilfarið verður talgildað, skrásett og dygdin í SavnsGull arbeiðinum verður kannað.

Sum nú er, verður arbeitt við tveimum viðgerðum: Fyrsta viðgerð, sum er komin nakað áleiðis, er tann, at bondini verða tikin niður av hillini og talgildað við útgerð frá týsku fyritøkuni TUBETEC. Skipanin hjá TUBETEC talgildir bondini, eins og har verður gjørd ein lítil skrásეting. Umframt at talgilda ljóð verður skrivligt tilfar skannað, so spjaldur og pappír, ið eru goymd ið hylkinum, vera talgildað og goymd.

Onnur viðgerð er um at vera klár. Í henni skulu allar skrásetingar, ið eru gjørdar áðrenn SavnsGull varð sett í verk, setast saman við bondtalgildingunum, skanningunum og skrásetingunum, ið eru gjørdar í SavnsGull. Síðani skal tilfarið kannast, um tað er á hædd við tann standard, ið settur verður. Eitt nýtt uppskot til skrásetingina er, at summar sendingar skula hava eitt GEO-tag. Hetta fer at geva Føroya fólki eina heilt serliga leitiskipan.

Árið 2015 hevur eisini hilnast væl, har tað eru talgild 5478 bond - meir enn vanta. Skrásetingin var útsett til 2016 vegna manglandi arbeiðsorku.

Avrit frá kvf.fo








## Talgilda - sjónvarpsbond

Sjónvarpsbondini er tann parturin í savninum, sum er ringast fyri. Men hetta er eisini tann parturin, sum krevur flestu fyrireikingar, áðrenn arbeiðið kann fara ígongd. Sjónvarpið var alment sett á stovn 1. apríl 1984 og sjónvarpsbondini eru 13.735 í talið. Talan er um fleiri ymisk sløg, ið krevja ymiskar førleikar og útgerð, ið er ring at fáa hendur á.

Sjónvarpssavnið er talt upp: 2358 bond eru talgildað og løgd á veitara, klár til nýtslu í Kringvarpinum. Talgildingarnar fara fram, tá gamalt tilfar skal brúkast í nýggjum sendingum ella tá sendingar skulu endursendast.

Tað eru ymisk sløg av bondum, ið ikki eru talgildað. Neyðugt er at talgilda summi uttan fyri kringvarpskarmarnar, tí kringvarpið hevur ikki tólini, sum heldur ikki kunnu útvegast.

Tey fyrstu bondini, sum skulu gjaldast uttan fyri karmarnar hjá kringvarpinum, eru U-Matic-bond. Tey eru 2882 í tali. U-Matic-bondini eru sera hótt, av tí at bondini forfarast og tey fara illa við bandmaskinunum, ið ikki kunna útvegast longur.

Vísindafólk innan talgildingarøkið vísa á, at einaferð millum 2023 og 2028 verður tað ikki møguligt at talgilda bond longur. Nærri vit koma hesi tíðarfreist, tess meira kostar tað at fáa tilfarið talgildað.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu nógv vit kunna fáa talgildað, um vit fáa gongd á sjónvarpsbondini í 2016 við einari árliga játtan á 600.000 kr.

Eftir at U-Matic-bondini eru talgildað, er klárt at talgilda BetaCam-bondini. Tað er tað síðsta, ið skal talgildast uttanfyri kringvarpið. Tann størsti parturin av savninum er DV25-bondini, ið vit kunna talgilda innan kringvarpskarmarnar.

Tann størsta forðingin at bjarga sjónvarpstilfari er, at verandi játtan ikki røkkur.




Avrit frá kvf.fo




## Upplýsing og vitan skapa virðið

Eitt, sum hevur stóran týdning í verkætlanini, er at fáa Kringvarpssavnið atkomiligt hjá Føroya fólki. Ein tann størsta avbjóðing í hesum sambandi er rættindi til tilfarið. Hvussu kunna vit skipa tað so, at øll fáa ágóðan av savninum? – At hoyra og síggja tað tey vilja!

Fyri at lýsa henda spurningin og vónandi seta gongd á hesa leið, skipaði SavnsGull og kringvarpið á vári 2015 fyri fyrilestrum um upphavsrætt, við serligum atlit til Kringvarpssavnið. Har vóru tríggir fyrilestrahaldarar - hvør á sínum øki. Torkil V. Rassmussen, ið starvast í Mentamálaráðnum, greiddi frá tí nýggju føroysku upphavsrættarlógini. Annette Hoffmann Pedersen, ið er deildarleiðari í DR, við ábyrgd fyri upphavsrætti, greiddi frá arbeiðinum hjá DR við rættindum til DR-savnið. Mikael Waldorff, ið hevur drúgvar royndir sum ráðgevi hjá rættindahavarum, greiddi frá støðuni hjá teimum, ið hava upphavsrættin.

Nógvir ymiskir áhugabólkar vóru umboðaðir, og stórur áhugi var fyri at fáa greiði á spurninginum um upphavsrætt, og hvussu hetta lógarverkið skal skipast í framtíðini. Áhugin sást serliga á øllum spurningunum, sum vórðu settir eftir fyrilestrarnar.

Ein boðskapur var greiður hjá øllum fyrilestrarhaldarum. Tað er í sambandi við, um tað skal bera til hjá øllum føroyingum at fáa ágóðan av savninum, tá teir hava hug ella ynskja at síggja ella hoyra sendingar ella brot úr sendingum. Fyri at kunna geva føroyingum henda møguleikan, t.d. á heimasíðuni hjá kringvarpinum, skulu avtalur um rættindini verða gjørdar, og helst við so fá savnandi feløg sum gjørligt.

Avrit frá kvf.fo

**FAKTA**

- **Tað vóru um 100 fólk til fyrilesturin, og tey umboðaðu nógvar ymiskar bólkar í hava tilknýti til kringvarpssavnið**
- **Greinar vóru skrivaðar í Dimmalætting, ið tóku støði í fyrilestrinum um Upphavsrætt**



## SavnsGull beinleiðis samskifti við Føroya Fólk

Avrit frá kvf.fo

SavnsGull er fyri fólkið, og vit gera nógv fyri at vera har Føroya fólk er.

Á Facebook og á kvf.fo er nakað av tilfari, ið kann hoyrast og síggjast, og har er eisini møguligt at fylgja við arbeiðinum, og síggja tær avbjóðingar, ið stinga seg upp.

Tað kemur eftirhondini meira enn so fyri, at SavnsGull er ein partur av tí, ið verður sent í Útvarpinum. Máltíð, Góðan Morgun Føroya, Dansival, Mentanarkaféin, eru sendingar har Savnsgull hevur verið at hoyra. SavnsGull hevur latið tilfar til sendingar, soleiðis at serstakt tilfar, ið kemur fram undan hillunum í savninum verður brúkt beinanvegin, og Føroya Fólk fær ágóðan av arbeiðnum hjá manningini á SavnsGulli.

Tá farast kann at talgilda sjónvarpspartin, er vónin eisini, at SavnsGull kann ríka um henda táttin í kringvarpshøpi.

Á Fólkafundinum, ið varð hildin í høllini á Hálsi í Havn, hevði SavnsGull bás. Hesin fundurin var gott høvi at vísa tað arbeiðið, ið verður gjørt í SavnsGulli, eins og at koma út til Føroya Fólk.

Tað er eisini javnan, at ymiskir persónar ella bólkar seta seg í samband við SavnsGull fyri at hoyra um verkætlanina og fyri at vita hvussu gongur. M.a. vitjaði Folketingets Kulturudvalg SavnsGull, tá nevndin vitjaði Føroyar seinast, og SavnsGull hevur vitjað Dansk Færøsk Kvindeforening. Í vetur varð SavnsGull eisini biðið um at hava eina framløgu til eitt tónleikatiltak í Reinsarínum í Havn. Har skuldi hugleiðast um, hvussu SavnsGull kundi vera við til at varðveita og lýsa føroyska tónleikasøgu.

Áhugin fyri verkætlanini røkkur víða.

**FAKTA**

- **2079 SavnsGull-vinir á Facebook**
- **SavnsGull hevur verið umbiðið at greiða frá verkætlanini 13 ferðir í 2015**

# Fíggjarstøðan 2015

Játtanin til SavnsGull í 2015 var 900.000 kr, og hon hevur verið nýtt til útvarpspartinum. Játtanin er fyri tað mesta farin til lønir. Ein minni partur er farin til at geva Føroya fólki vitan og ágóða um SavnsGull og tilfarið í Kringvarpssavninum.

Avrit frá kvf.fo

| | Fíggjarstøða 2014 | Fíggjarstøða 2015 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 578.735,00 | 845.548,00 |
| Keyp av vørum og tænastum | 91.855,00 | 46.312,00 |
| Keyp av útbúnaði | 117.737,00 | 3.112,00 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 26.192,00 | 5.028,00 |
| Tilsamans | 814.520,00 | 900.000,00 |



# Fólkið í SavnsGull í 2015

## Stýrisbólkur

**Andras Mortensen**
Stjóri av Søvn Landsins og formaður í Stýrisbólkinum

**Dia Midjord**
Stjóri í Kringvarpinum og verkætlanarleigari

**Jóhann Mortensen**
Leiðslusamskipari í Kringvarpinum

## SavnsGull

**Mass Hoydal**
Verkætlanarleiðari

**Regin Davidsen**
Skrásetari og talgildari

**Jógvan í Toftum Olsen**
Talgildari

**Finnbjørn Hansen**
Talgildari

**Joen Peter Elsborg Bjørk (Jógvan Bjørk)**
Skrásetari

**Bárður Joensen**
Skrásetari

**John Eli Lisberg**
Skrásetari

**Sjúrður Fjallsbak**
Skrásetari

**Kriminalforsorgin**
Fólk úr Mjørkadali hevur skrásett pappírstíðindi

Avrit frá kvf.fo

## Stuðlar, samskifti og íblástur

At útvarpssavnið nú verður varðveitt til komandi ættarlið, kemst serliga av tí støðu, at Mentamálaráðið raðfestir hetta arbeiðið, og at Kringvarp Føroya stuðlar við hølum, tólum og serkunnleika. Søvn landsins er ein týdningarmikil ráð- og hugskotsgevi til spurningar um skráseting og annað.

Góð fólk eru komin frá Almannaverkinum. Tey hava longu bjargað einum stórum parti av tilfarinum. Uttan hesa arbeiðsorku vildi hesin dýrgripur ikki verið varðveittur, so skjótt sum gjørt er. Og við einum samstarvi við Kriminalforsorgina - har fólk í Mjørkadali skráseta tíðindaskjølini - fer væntandi enn meira ferð at koma á verkætlanina.

Samskifti og íblástur er komið úr Føroyum, úr grannalondum, eins og uttan úr heimi. Í september var Mass Hoydal á ráðstevnu hjá felagsskapinum IASA, har nógv týdningarmikil sambond vóru fingin við fakfólk innan økið. Friisframe hevur verið tøkt við servitan, og eisini hevur verið vitjað á m.a. Statsbibliotekinum í Århus og á Dansk Film Istitut. Vit hava fingið vitan og íblástur til, hvussu farast kann at talgilda sjónvarpsbondini.

Avrit frá kvf.fo